## Fullir menn á brúnni

Tað var ikki so løgið, at farmaskipið “Karin Schepers” fór á land við Saltholm uttan fyri Keypmannahavn um vikuskiftið. Tá loðsurin kom umborð, vísti tað seg, at stýrimaðurin lá avdottin uppi á brúnni. Loðsurin sendi tí boð eftir løgregluni. Hon bað um at sleppa at tosa við skiparan, men tað vísti seg, at hann var eisini fullur, og tað er lógarbrot, sama um skiparin hevur vakt ella ikki. Skiparin og stýrimaðurin blivu tiknir við til lands. Har blivu teir avhoyrdir, men vórðu síðani latnir leysir. Ritzau skrivar, at “Karen Schepers” er skrásett í Antigua og Bermuda, og at manningin helst er russisk.



## Neyðtøkur umborð á ferjum

Løgreglan í Svøríki fekk leygardagin fráboðanir frá trimum kvinnum, sum søgdu seg vera neyðtiknar umborð á ferjum, sum sigla ímillum Stockholm og Mariehamn í Álandi. Ein av kvinnunum skuldsetti seks menn fyri at hava neyðyikið seg. Løgreglan í Stockholm sigur við tíðindastovuna TT, at kvinnan meldaði menninar, meðan ferjan var á veg úr Stockholm til Álands leygarnáttina, og at løgreglan tók menninar, tá ferjan kom til Mariehamn. Dagin eftir kærdi ein onnur kvinna seg um neyðtøku umborð á einari ferju, og sunnunáttina meldaði ein tilkomin kvinna tveir 15 ára gamlar drongir fyri neyðtøku.

# Standa púra spyrjandi

**Forstjórin í Eik Banka, Marner Jacobsen, kennir als einki til, at Eik Grunnurin og harvið Eik Banki skal vera í svárum fíggjarligum trupulleikum. – Vit hava innfríað eitt lán, sum Eik Grunnurin hevði í einum donskum konkursbúgvi, tað er alt, sigur Marner Jacobsen**

FÍGGJAREFTIRLIT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka, kennir als einki aftur í teirri blaðgrein, sum stendur í Jyllandsposten um vikuskiftið.

- Tað undarliga er, at hendan blaðgrein er skrivað út frá einari samrøðu, sum hesin blaðmaðurin, Thomas G. Svaneborg, hevði við meg. Og hóast eg greiddi honum frá støðuni, so hevur hann vent øllum á høvdið, sigur Marner Jacobsen.

Tá danski Ebh Bank fór av knóranum og statsliga avviklingsfelagið yvirtók bankan, varð eitt lán, sum Eik Grunnurin hevði hjá bankanum uppsagt, og tað er hetta lánið, sum Eik nú hevur innfríað.

- Tað verður eisini róð upp undir, at Skráseting Føroya skal hava innkallað til kreppufundar í dag, men heldur ikki hetta hevur blaðmaðurin fingið rætt í hálsin. Søgan um fundin í dag er ein heilt onnur, sigur Marner Jacobsen.

Hann sigur, at bankin tann 24. februar fekk eina áheitan frá Skráseting Føroya um at koma við nøkrum upplýsingum, og henda áheitan varð viðgjørd á nevndarfundi tann 26. februar. Eftir hetta vórðu upplýsingarnar savnaðar og frágreiðing skrivað, og hetta varð alt góðkent á nýggjum nevndarfundi 20. mars.

- Og tað er hetta, fundurin í dag snýr seg um. Tað var heldur eingin freist ásett í áheitanini frá Skráseting Føroya, og fundurin í dag er fingin í lag fyri at vit kunnu greiða frá teimum upplýsingum, sum vit geva skrásetingini, sigur Marner Jacobsen.




*Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka, stendur púra spyrjandi nú tað í donskum blaði verður róð upp undir, at Eik Grunnurin og harvið Eik Banki er í stórum fíggjarligum trupulleikum*

### Ikki mín avgerð

Tá róð verður upp undir, at tað kann vera óheppið, at sami nevndarformaður er í Eik Banka og í Eik Grunninum, so er tað ikki nakað, sum forstjórin í bankanum hevur funnið upp á.

- Tað stendur beinleiðis í lógunum, at nevndarformaðurin í Eik Grunninum skal koma frá nevndini í bankanum, so tað er ikki nakað, leiðslan hevur funnið upp á, sigur Marner Jacobsen.

Hann vísir eisini á, at Eik Grunnurin hevur ein eginkapital, sum er omanfyri 1,5 milliardir krónur, og tí skilir hann ikki, at nakar kann pástanda, at ognirnar hjá grunninum eru »misligholdt«, sum tað eitur í greinini hjá blaðmanninum.

- Blaðmaðurin rør eisini upp undir, at tað skal vera nakað suspekt við partabrævasøluni í Investea Sweden Properties, tí vit máttu staðfesta eitt tap upp á hesa søluna. Men sum eg eisini segði við hann, at sjálvt um tað so vóru AP Møller partabrøv, vit seldu, so høvdu vit eisini staðfest eitt tap har, heilt einfalt tí at støðan á partabrævamarknaðinum er, sum hon er, sigur Maner Jacobsen.

Forstjórin í Eik Banka avvísir tí staðiliga, at nakar vandi er á ferð, hvørki hjá Eik Banka ella hjá Eik Grunninum.

Tað er í hvussu er ikki nakað, vit kenna nakað til, sigur Marner Jacobsen.

# Stendur fyri teirra egnu rokning

**Kristin Balle, stjóri á Skráseting Føroya, vísir aftur, at stovnurin hevur í hyggju at krevja nevndina í Eik Grunninum frá. – Vit hava biðið um nakrar upplýsingar frá bankannum, og tær hava vit fingið í morgun. Meiri er fyribils ikki í málinum, sigur stjórin á Skráseting Føroya**

FÍGGJAREFTIRLIT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit hava biðið um eina frágreiðing frá Eik Banka um nøkur ávís viðurskifti, og teir hava so valt at koma á fund við okkum at greina hesar frágreiðingar út. Meiri liggur fyribils ikki í hesum málinum, sigur Kristin Balle, stjóri á Skráseting Føroya.

Tað er sostatt eingin niðurstøða gjørd av fundinum við Eik, og á skrásetingini fara tey nú fyrst at kanna frágreiðingina, áðrenn nakað meiri hendir í málinum.

Eisini Kristin Balle hevur hoyrt um greinina í Jyllandsposten, har meiri enn róð verður upp undir, at fundurin í dag er ein kreppufundur, sum kann enda við, at Skráseting Føroya fer at seta nevndina í Eik Grunninum frá. Men hesum vísir Kristin Balle aftur.

- Hatta má standa fyri teirra egnu rokning. Vit hava als ikki úttalað okkum í hesum málinum, og tað einasta vit hava gjørt, er at biða um nakrar upplýsingar, sigur Kristin Balle.

Hon sigur, at tað finst ein grein í lógunum, sum heimilar Skráseting Føroya at seta eina nevnd frá, men tá skal tað verða av meiri formligum orsøkum enn talan er um her.

- Eg dugi ikki at ímynda mær, at tað kemur upp á tal at koyra nevndina frá, sigur Kristin Balle beint út.

### Tekur sína tíð

Tað er ikki meiri enn eitt gott ár síðani, at Skráseting Føroya yvirtók eftirlitið við grunnunum í Føroyum, og tí hava tey lítlar og ongar royndir í so máta.

- Fram til 1. januar var tað Erhvervs- og Selskabsstyrelsen, sum hevði eftirlitið við grunnunum, og við teimum vantandi royndunum á økinum er tað ikki óhugsandi, at vit fara at venda okkum til teirra fyri at vita, hvussu tey takkla slík mál, sigur Kristin Balle.

Nú fara tey so at lesa frágreiðingina frá Eik nærri, áðrenn nøkur støða verður tikin til málið.

- Vit ætla okkum at taka ta tíð, tað tekur at avgreiða málið, og tað er væl hugsandi, at vit fara at hava eitt ávíst samskifti við Eik hetta tíðarskeiði. Vit hava sum nevnt ikki tær stóru royndirnar á økinum, so vit fara at brúka neyðugu tíðina, sigur Kristin Balle, stjóri á Skráseting Føroya.



*Kristin Balle, stjóri á Skráseting Føroya, dugir ikki at ímynda sær, at nevndin í Eik Grunninum verður sett frá*

*Mynd: Jens Kristian Vang*